VÍF-Stjørnan 19-26(9-13)

# Stjørnan vann útsettan dyst

**Útsetti dysturin millum VÍF og Stjørnuna í Sunset-kappingini varð leiktur í Vestmanna fríggjakvøldið**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Stjørnan heldur tørn í oddinum á fremstu hondbóltsdeildini hjá kvinnum. Fríggjakvøldið vóru kvinnurnar úr Klaksvík í Vestmanna, har tær spældu útsettan dyst móti VÍF. Dysturin skuldi upprunaliga verið leiktur undanfarna vikuskifti, men av tí at bróðurparturin av manningini hjá Stjørnuni lá við krím, var dysturin útsettur.

### VÍF byrjaði betur

Tað var annars heimaliðið VÍF, sum byrjaði dystin betur, men so líðandi kom Stjørnan fyri seg.

VÍF var á odda 5-3, 6-4 og 8-6, men so gjørdi Stjørnan ein vørr móti endanum av fyrra hálvleiki, og tær fóru frá at vera aftan fyri við tveimum málum til at verða á odda við fýra.

Tá ið klaksvíksliðið hevði fingið leiðsluna, var ongin vegur aftur hjá VÍF. Stjørnan hevði munin, og tíðliga í seinna hálvleiki sprellaðu tær aftur, og so var ongantíð nakar ivi um sigurin hjá oddaliðnum.

Tær øktu støðugt um leiðsluna hjá sær, og tað var greitt, at VÍF ikki var ført fyri at berja seg upp á javnt aftur.

Stjørnan vísti aftur í hesum dystinum, at tær hava sonevndar periodur, har tær skora fleiri mál, uttan at mótstøðuliðið fær skorað, og tað vóru slíkar periodir, sum í veruleikanum avgjørdu dystin.

Gestirnir vóru á odda 19-12 miðskeiðis í seinna hálvleiki, men so svaraði VÍF eitt sindur aftur og kom upp á 16-19, áðrenn Stjørnan gjørdi enn einaferð ein vørr, og so var bráddliga 23-16 til oddaliðið.

Tá ið dysturin var liðugur, vóru sjey mál á muni millum liðini. VÍF hevði fingið 19 mál, meðan Stjørnan hevði fingið 26 og harvið tryggjað sær bæði stigini.

### VÍF-Stjørnan 19-26(9-13)

**VÍF:** Fríða Marjunardóttir 6(3), Ioana Rapa 5, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 5, Linda Johannesen 1, Finngerð Jensen 1, Kirstin Helgadóttir 1
**Stjørnan:** Joan M. Djordjevic 6, Katarina Stjepanov 5(2), Annika Ljósstein 4(4), Maria við Neyst 3, Alina Olaru 3, Una Olsen 3, Birita Joensen 1(1), Bára S. Klaksstein 1
**Brotskøst:** VÍF 4(3), Stjørnan 6(6)
**Útvísingar:** VÍF 6, Stjørnan 2
**Dómarar:** Heri Petersen og Brandur Johansen
**Áskoðarar:** 100

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v | j | t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 3 | 3 | 0 | 0 | 432 | 329 | 103 | 19 |
| 2 VB | 2 | 2 | 0 | 0 | 527 | 312 | 215 | 17 |
| 3 Neistin | 3 | 1 | 0 | 2 | 465 | 377 | 88 | 12 |
| 4 Søljan | 2 | 2 | 0 | 0 | 429 | 368 | 61 | 12 |
| 5 VÍF | 3 | 1 | 0 | 2 | 391 | 397 | -6 | 7 |
| 6 StÍF | 3 | 1 | 0 | 2 | 389 | 436 | -47 | 7 |
| 7 Kyndil | 3 | 1 | 0 | 2 | 341 | 452 | -111 | 5 |
| 8 Tjaldur | 3 | 0 | 0 | 3 | 264 | 567 | -303 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | dystir | v | j | t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 6 | 5 | 0 | 1 | 473 | 423 | 50 | 18 |
| 2 Kyndil | 6 | 2 | 0 | 4 | 470 | 397 | 73 | 12 |
| 3 KÍF | 6 | 3 | 1 | 2 | 407 | 433 | -26 | 11 |
| 4 StÍF | 6 | 3 | 2 | 1 | 422 | 452 | -30 | 11 |
| 5 H71 | 6 | 2 | 0 | 4 | 459 | 469 | -10 | 9 |
| 6 Neistin | 6 | 1 | 1 | 4 | 441 | 498 | -57 | 6 |

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 162 (52) |
| Nicoleta Radu Hansen | Søljan | 161 (22) |
| Ioana Rápa | VÍF | 136 (30) |
| Simona Petersen | Neistin | 118 (29) |
| Lina Andriulyte | Søljan | 95 (13) |
| Randi Wardum | Kyndil | 93 (16) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 89 (4) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 85 (9) |
| Marjun Tróndarson | Neistin | 79 (16) |
| Sunfríð B. Jacobsen | StÍF | 76 (30) |
| Katarina Stepanov | Stjørnan | 73 (10) |
| Poula D. Olsen | StÍF | 70 |
| Rannvá Augustinussen | VB | 70 (1) |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 70 (7) |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 66 (2) |

**Menn**

| | | |
|---|---|---|
| Halgir D. Olesen | H71 | 107 (13) |
| Damir Oros | Neistin | 102 (18) |
| Ingi Olsen | VÍF | 99 (26) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 97 (8) |
| Agnar Joensen | VÍF | 83 (6) |
| Áki Mørk | Neistin | 83 (7) |
| Leivur Justinussen | StÍF | 83 (16) |
| Regin Petersen | KÍF | 81 (8) |
| Piti Negru | H71 | 79 (5) |
| Høgni Klein | Kyndil | 78 (3) |
| Henrik Gerster | H71 | 69 (6) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 68 (13) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 68 (21) |
| Jakob Jónsson | Kyndil | 63 (2) |
| Blagoje Buha | Neistin | 62 (10) |

# Borðtennisungdómar kappaðust í Danmark

Føroyskir bordtennisleikarar hava í vikuskiftinum luttikið í stórari kapping í Danmark. Kappingin vard hildin í stóri Brøndby høllini har fleiri hundrad bordtennisleikarar luttóku. 14 føroyskir spælarar í aldrinum 12-16 ár vóru vid og teir stódu seg væl.

Úrslitini hjá teimum 14 føroysku spælarunum vóiur góðu, og tað vóru nakrir vælnøgdir spælarar, ið komu aftur til Føroya mánadagin. Úrslitini hjá teimum føroysku borðtennispælarunum vóru hesi:

**Gentur 11-12 ár bólkur b**
**Einmansleikur**
Nr. 1 Rakul Mikkjalsdóttur
Nr. 2 Sheila Strøm

**Gentur 11-12 ár bólkur a**
**Einmansleikur**
Nr. 2 Rakul Mikkjalsdóttur
Nr. 3 Sheila Strøm

**Dreingir 11- 12 ár bólkur c**
**Einmansleikur**
Nr. 1 Fródi Jensen
Nr. 2 Gilli Sørensen

**Blandadur tvímansleikur**
Nr. 1 Fródi Jensen og Gilli Sørensen
Nr. 2 Rakul Mikkjalsdóttur og Sheila Strøm

**Gentur 13 - 14 ár bólkur a**
**Einmansleikur**
Nr. 3 Joan Thomasen

**Gentur 13 - 14 ár bólkur c**
**Einmansleikur**
Nr. 3 Joan Thomasen

**Gentur 13 - 14 bólkur c**
**Tvímansleikur**
Nr. 1 Susie Midjord og Joan Thomasen

**Gentur 13 -14 bólkur a**
**Einmansleikur**
Nr. 3 Susie Midjord

**Gentur 13 -14 bólkur b**
**Einmansleikur**
Nr. 1 Susie Midjord

**Dreingir 13-14 bólkur c**
**Einmansleikur**
Nr. 1 Hallur Thorsteinsson
Nr. 2 Pætur Albinus
Nr. 3 Sjúrur Ferjá

**Gentur 15 - 17 ár bólkur a**
**Einmansleikur**
Nr. 2 Marin í Dali

**Gentur 15 - 17 ár bólkur b**
**Einmansleikur**
Nr. 3 Marin í Dali

Ferðalagið fór til Danmarkar fríggjadagin 18. februar og verdur aftur í Føroyum mánadagin tann 21. Leikararnir lata væl at og lata heilsa.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin
-har tað hendir